Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 29. sept. 2023
Mál nr.: 23/18109-13
Málsviðgjørt: HP

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, § 11 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022 og § 6 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, verður § 26 orðað soleiðis:
§ 26. Stuðul verður veittur til keyp av bili til persón við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika, ið munandi skerjir møguleikarnar at ferðast, ella ger tað trupult at fáa ella varðveita eitt arbeiði ella eina útbúgving uttan brúk av bili. Stuðulin verður veittur sum eitt rentufrítt lán, sum í mesta lagi er 180.000 kr. *Stk. 2.* Gera serlig viðurskifti seg galdandi í sambandi við avmarkaða førleikan, kann eitt rentufrítt og avdráttarfrítt lán veitast til	"**§ 26.** Stuðul til serligan útbúnað til bil verður veittur persóni, ið hevur varandi virkistarn, tá bilur: 1) er neyðugur fyri, at persónurin kann koma til og frá arbeiði ella útbúgvingarstaði, 2) munandi bøtir um avleiðingarnar av skerda virkisførinum hjá persóninum, ella 3) munandi lættir um gerandisdagin hjá persóninum.

at gjalda munin millum stuðulin sambært stk. 1 og prísin fyri at útvega ein dýrari bil. *Stk. 3.* Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til vektgjald á bili, skrásettur áðrenn 1. januar 2017, við eginvekt oman fyri 1300 kg. Hetta er eisini galdandi, verður bilur sambært 1. pkt. endurskrásettur eftir 1. januar 2017. *Stk. 4.* Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til umhvørvisgjald á bili við CO_2 útláti oman fyri 120 gramm pr. kilometur. Stuðul verður bert veittur til bil við eginvekt oman fyri 1300 kg. *Stk. 5.* Persónur, sum lýkur treytirnar sambært stk. 1, kann fáa stuðul til meirkostnað í sambandi við at taka koyrikort og endurnýggjan av koyrikorti. *Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um: 1) treytir og umstøður fyri at fáa stuðul eftir stk. 1 og 2, 2) afturrindan av láni, herundir freistir fyri afturrindan og treytir fyri at eftirgeva lán umframt inntøkugrundarlagið fyri at afturgjalda, 3) møguleikan at fáa stuðul til at útskifta ein bil, ið stuðul er veittur til, sambært stk. 1 og 2, 4) stuðul til neyðuga innrættan o.a., 5) í hvønn mun, stuðul kann veitast til at gjalda koyrifrálæru o.a., 6) stuðul til persón, ið kemur inn í landið og hevur ein bil við, 7) treytir fyri at játta stuðul til vektgjald ella umhvørvisgjald eftir stk. 3 og 4, og 8) árliga prístalsjavning av upphæddini í stk. 1.	*Stk. 2.* Stuðul sambært stk. 1 verður bert veittur, um Akstovan krevur serliga útbúnaðin. *Stk. 3.* Kostnaðurin av serligum útbúnaði, ið stuðul verður veittur til sambært stk. 1, kann ongantíð vera hægri enn helvtina av virðinum av bilinum, um bilurin er eldri enn 3 ár. *Stk. 4.* Hevur virkistarnið við sær, at tørvur er á kassabili fyri at lúka treytirnar um flutning sambært stk. 1, verður stuðul eisini veittur at keypa kassabil. Fíggjarligur stuðul til kassabil verður veittur sum: 1) rentufrítt lán upp á 219.555 kr., og 2) rentufrítt og avdráttarfrítt lán upp á eina upphædd svarandi til munin millum 219.555 kr. og kostnaðin av bilinum. *Stk. 5.* Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til vektgjald til bil við eginvekt omanfyri 1300 kg, ið er skrásettur áðrenn 1. januar 2017. Hetta er eisini galdandi, verður bilurin endurskrásettur eftir 1. januar 2017. *Stk. 6.* Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til umhvørvisgjald á bili við CO_2 útláti oman fyri 120 gramm pr. kilometur. *Stk. 7.* Persónur, sum lýkur treytirnar sambært stk. 1 ella 4, kann fáa stuðul til meirkostnað í sambandi við at taka koyrikort og endurnýggjan av koyrikorti. *Stk. 8.* Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um: 1) treytir og umstøður fyri at fáa stuðul sambært stk. 1 og 4, 2) afturrindan av láni, herundir freist fyri afturgjaldi og treytir fyri at eftirgeva lán umframt inntøkugrundarlagið í sambandi við afturgjaldið, 3) møguleikan at fáa stuðul til at útskifta bil, ið stuðul er veittur til sambært stk. 4, 4) stuðul til neyðuga innrættan o.a., 5) í hvønn mun stuðul kann veitast til at gjalda koyrifrálæru o.a., 6) treytir fyri at játta stuðul til vektgjald ella umhvørvisgjald eftir stk. 5 og 6,

	7) stuðul til persón, ið flytur til Føroyar og lýkur treytirnar í stk. 4, og sum hevur bil við, og árliga prístalsjavning av upphæddini sambært stk. 4.”
	§ 2 *Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024. *Stk. 2.* Umsóknir um stuðul, sum ikki eru avgreiddar, tá hendan løgtingslógin kemur í gildi, verða viðgjørdar og avgreiddar sambært higartil galdandi reglum.